Móttøka hjá KRIS 4. desember 2018

Góðan dagin, og takk fyri, at eg varð boðin at siga nøkur orð, nú tit lata upp í tykkara nýggju húsum her á Toftum.

Ongar gyltar borgir hjálpa teimum, sum stríðast við fylgjur eftir kynsligan ágang. Og væl veit eg, at tey finna ikki ugga og stuðul í flottum húsum.

Men tað er nú ein sannroynd, at fysiskir karmar *hava* týdning, tá fólk skulu trívast og tá starvsfólk skulu kunna gera sítt ítasta.

So eg ivist ikki í, at tað fer at lætta um hjá tykkum í gerandisdegnum, nú tit hava fingið nógv betri umstøður til tykkara virksemi. Og eg vóni eisini, at hetta fer at merkjast hjá tykkara viðskiftafólki.

Eg havi annars vitjað tykkum og sitið væl á Heiðavegnum í Runavík. Har var altíð hugnaligt at koma á gátt. Tann hugnan og tann góða stemningin skapa tit við tykkara máta at vera uppá og við tykkara evnum at fáa fólk at kenna seg væl og kenna seg trygg.

Hesar kenslur eru nakað, ið fysiskir karmar ikki kunnu fáa fram, men sum er *innihaldið* í kørmunum.

Eg veit, at tit í nógv ár hava ynskt tykkum betri og størri høli og tit hava stríðst fyri at fáa hetta ynskið uppfylt. Bæði starvsfólk og eisini nógv sjálvboðin hava verið við til at gera ynskið til veruleika.

Tí fegnist eg í dag við tykkum og við teimum mongu føroyingum, sum hava tykkara hjálp og stuðul fyri neyðini.

Tíverri, kunnu vit siga, eru tey mong, sum hava brúk fyri tykkum.

Og tíbetur, kunnu vit so leggja afturat, eru tit her at taka ímóti teimum.

Eg gleðist um, at vit tey seinnu árini hava tosað meira um kynsligan ágang, enn nakrantíð áður. Kynsligur ágangur man vera eitt tað mest pínufulla tabu, vit hava í okkara lítla samfelag, eins og nógva aðrastaðni við.

Í arbeiðinum hjá okkum í Almannamálaráðnum at seta í verk Heildarætlan um kynsligan ágang, eins og Heildarætlan um harðskap, hava kunning og upplýsing verið sera høgt raðfest.

Kynsligur ágangur skal ikki tigast burtur. Tí tað óunniliga og ótespiliga hvørvur ikki, um vit dylja tað.

Tað, at hesi evni eru sett á dagsskránna seinastu árini og eru blivin meira umrødd, enn nakrantíð, eiga eisini tit lut í: Millum annað tykkum fyri at takka, eru tey fleiri og fleiri, ið tora at traðka fram og krevja, at okkurt skal verða gjørt. Hetta hóast vit øll vita, at tað er als ikki lætt at traðka fram í okkara lítla samfelag.

Tað ber ikki til at nevna KRIS, uttan at nevna Gvøðbjørg West. Gvøðbjørg er sjálv ímyndin av KRIS og av tí stóra arbeiði, tit hava gjørt í skjótt nógv ár.

Og eg sá onkustaðni, at Gvøðbjørg nú í 20 ár hevur staðið á odda fyri KRIS. Tillukku við tí, Gvøðbjørg!

Aftanfyri hvørja raska kvinnu stendur ein maður, og eg skilji, at soleiðis er eisini hjá Gvøðbjørg, tí maðurin. Olaf, eigur nógvar arbeiðstímar her í húsinum.

Tillukku við tí, Gvøðbjørg og tillukku Olaf – og eg ynski tykkum nógv góð ár afturat!

¤¤¤¤

Av sonnum eru hetta snotilig og hugnalig høli, tit hava innrættað tykkum her.

Eg fari at enda enn einaferð at ynskja tykkum hjartaliga tillukku og takka tykkum fyri tykkara treiskni og áhaldni og stríð at hjálpa teimum, sum hava verið fyri kynsligum ágangi.

Bestu eydnu frameftir!

Takk fyri.

Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinna